Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjarni Kárason Petersen, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Meirvirðisgjald á ferðaleiðaravirksemi

Spurningar:

1. Er landsstýrismaðurin samdur við tulkingini hjá TAKS um, at ferðaleiðarar skulu leggja meirvirðisgjald á sítt vinnuliga virksemi?
2. Hvat fyri eykainntøkur kann landskassin rokna við í samband við, at ferðaleiðarar nú skulu rinda meirvirðisgjald av sínum tænastum?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at tryggja, at ferðaleiðarar ikki skulu rinda meirvirðisgjald, hóast TAKS hevur staðfest eina aðra lógartulking grundað á MVG-lógina?

Viðmerkingar:
Eftir ymiskar tulkingar hevur TAKS staðfest, at ferðaleiðarar skulu leggja meirvirðisgjald á sítt virksemi.

Ferðaleiðaravirksemi hevur annars verið tulkað sum MVG-frítt í fleiri ár. Tað er síðani komið eftir, at tulkingin ikki var røtt, og hevur mann nú tikið avgerð um at áleggja ferðaleiðaravirksemi meirvirðisgjald. Í sambandi við kæru um málið hevur Skatta- og avgjaldskærunevndin havt spurningin til viðgerðar og hevur í niðurstøðu tikið undir við avgerðini hjá TAKS, og er ferðaleiðaravirksemi tískil endaliga staðfest av TAKS at vera mvg-skyldugt.

Ein frammanundan bløðandi ferðavinna í óvanliga truplum umstøðum orsakað av COVID-19 og tiltøkum í tí sambandi fær tað enn truplari av slíkari avgerð, og er meirvirðisgjaldið eisini kappingaravlagandi í kappingini við okkara grannalond og onnur ferðavinnumál. Avleiðingin kann vera, at sjálvstøðug vinnurekandi steðga sínum virksemi vegna vánalig framtíðarútlit í ferðavinnuni. Tí verður spurt, um landsstýrismaðurin ætlar at gera nakað við íkomnu støðuna.

Á Løgtingi, 17. mai 2021

Bjarni Kárason Petersen